# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 24.06.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Martin í Nesi
Eir J. Norðberg
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-14-2024: Kommunusamanlegging – vegleiðandi fólkaatkvøðan.**

Á bygdarráðsfundi tann 08.05.2024 varð samtykt við 6 atkvøðum fyri, at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging í Hvalba og á Tvøroyri samstundis um hálvan juni 2024. Dagurin varð síðani ásettur til leygardagin tann 15. juni 2024, har atkvøðast skuldi NEI ella JA.

Valrætt til vegleiðandi fólkaatkvøðuna høvdu

| | |
|---|---|
| Á valstaðnum í Hvalba | 441 veljarar |
| Á valstaðnum í Sandvík | 62 veljarar |
| Tilsamans | **503 veljarar** |

Úrslitið av vegleiðandi fólkaatkvøðuni aftaná fínteljing varð, at 218 veljarar atkvøddu NEI, 53,04% og 193 JA, 46,96%. Samlaða valluttøkan var 81,71%.

**Avgerð:**

Janus Thomsen, borgarstjóri skjýtur upp, at atkvøtt verður um at fylgja vegleiðandi fólkaatkvøðuni. Samtykt við fimm atkvøðum fyri.

2. **102-23-2024: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 160d og 337, Hvalba.**

Søkt verður um marknaumskipan, har matr. nr. 160d, Hvalba letur umleið 45 m2 til matr. nr. 337, Hvalba. Bæði matr. liggja í sethúsaøki.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

3. **102-26-2024: Tilboð frá Sp/f Munin um almenna síðu av staðarnøvnum.**

| | |
|---|---|
| Kostnaðurin fyri uppsetan av almennari loysn | kr. 50.640,00 uttan MVG |
| Árligur rakstur | kr. 10.585,00 uttan MVG (hækking 2% árliga) |

**Fíggjarnevndin 21.06.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Munin.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **102-3-2024: Hvalbiar skúli – dagførd kostnaðarmeting endurbjálving av lofti v.m.**
Upprunaliga kostnaðarmetingin fyri endurbjálving v.m. av lofti í skúlanum var kr. 1.314.600,00. Dagførd kostnaðarmeting, har øll loftini eisini verða skift, umframt el-innlegging, skinnarar, lampur v.m. er kr. 1.727.580,00,00, t.v.s. ein meirkostnaður á kr. 412.980,00.
**Fíggjarnevndin 21.06.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum, treytað av, at peningur verður funnin innanfyri verandi løgukarm.
**Avgerð:**
Samtykt við 4 atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

Poul Laust Christiansen luttók ikki í máli nr. 5

5. **102-28-2024: Tilboð uppá fjarskiftishald.**
Innkomnu tilboðini eru:

| | |
|---|---|
| Føroya Tele (leingjan av avtalu – 3 ár) | kr. 6.693,43 pr. mánaða (við 15% avsláttri) |
| Suðurnet (nýtt tilboð – 4 ár) | kr. 8.576,00 pr. mánaða (við 17% avsláttri) |

**Fíggjarnevndin 21.06.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Føroya Tele.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini, treytað av, at bøtt verður um netsambandið í Hvalbiar skúla og á kommunuskrivstovuni.

6. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson

Martin í Nesi Eir J. Norðberg Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen